# Óli og teir takast við HB

**Hvidovre kemur við sínum sterkasta liði til Føroya at spæla ímóti HB. Venjarin hjá Hvidovre hevur tvær ferðir vant føroyskt felag**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Tað verða útlendskir fótbóltsgestir á ólavsøku í ár. Hetta er einki nýtt fyribrigdi, og áður hava verið nógvir undirhaldandi dystir av hesum slagi á ólavsøku.

Í ár er tað HB, sum verður vertur fyri fótbóltsgestum úr Hvidovre í Danmark. Hvidovre spælir í næstbestu donsku deildini, men tað, sum ger hetta felag serliga lokkandi, er helst, at føroyski landsliðsspælarin, Óli Johannesen, spælir í Hvidovre.

Óli er ein av 11 yrkisspælarum, sum hoyra til felagið, og hann verður eisini mettur sum ein av teimum, sum eigur fast pláss á liðnum. Umframt yrkisspælararnar eru tveir aðrir sum hava sáttmála við felagið, meðan fimm amatørar eru í hópinum.

### Venjarin vant TB

Millum spælararnar í Hvidovre eru onkrir, sum fótbóltsáhugaðir helst kennast við.

Ein av teimum er Allan Kuhn, sum hevur spælt í nógv ár, og eitt skifti var liðfelagi hjá Toda Jónsson í Lyngby. Ein annar er kanska Kaan Metins, sum hevur spælt í superligafelagnum AB.

Harafturat hevur venjarin hjá Hvidovre havt nógv samband við Føroyar.

Frank Skytte hevur í tveimum førum verið venjari hjá TB, og hann hevði eisini stóran leiklut í keypinum av Óla Johannesen. Frank Skytte hevur drúgvar royndir sum venjari.

Dysturin er leygardagin kl. 17.30.



*Ólavsøkuaftan fara Jón Rói Jacobsen og hinir í HB at dystast ímóti Hvidovre*

### Skuggin

Hvidovre hevur verið nógv frammi í donskum fótbólti tey seinastu knapt fjøruti árini. Tey seinnu árini hava teir havt tað torførari, enn teir høvdu tað seinnapartin av seksti og í sjeyti árunum. Orsøkin hevur verið tann, at teir komu í skuggan av grannunum í Brøndby.

Tá Hvidovre í 1966 fyrstu ferð vann danska meistaraskapin í fótbólti, var tað eftir eina glæsiliga gongd, ið minti nógv um tað, sum í áttati árunum var eyðkent fyri framburðin í Brøndby. Hvidovre fór við ferð frá uppflyting og til uppflyting, og tað endaði við, at teir í 1966 settu gomlu keypmannahavnar feløgini– eitt nú KB, B 1903, AB og arbeiðarafelagið Frem – upp á pláss.

Tá fekk Hvidovre fleiri spælarar á landsliðið. Vit kunnu t. d. nevna málverjan Jørgen Henriksen, sum seinni hevur verið venjari hjá málverjum, og John Steen Olsen, sum tey seinnu árini hevur verið ein av mongum fótbóltsumboðsmonnum í Danmark. Tað er ikki so langt síðani, at hann var í Føroyum fyri at kanna, um ungir føroyskir fótbóltsspælarar kunnu seljast víðari.

Felags fyri hesar báðar og fleiri aðrar spælarar hjá Hvidovre síðst í seksti og fyrst í sjeyti árunum var, at teir – sum so nógvir aðrir fótbóltsspælarar í Danmark – vórðu seldir til onnur feløg í Europa fyri lítið og lætt.

# Tangz og All that Rain hita upp



**Undan steypafinaluni hjá monnum fara rockbólkarnir Tangz og All that Rain at hava konsert á Tórsvølli**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Tað verður ikki hissini upphiting, sum áskoðararnir til finaluna í kappingini um Løgmanssteypið fáa.

Áðrenn ársins fótbóltsdystur verður bríksladur í gongd sunnudagin klokkan 16.00, fara tveir av fremstu rockbólkunum í landinum at spæla á Tórsvølli.

Talan er um Tangz og All that Rain, sum fara at leggja lunnar undir finaludystin. Hesir báðir bólkar hava spælt á konsert saman áður. Seinasta framførslan var so seint sum leygarkvøldið í Trongisvági, har fleiri enn 500 áhoyrarar vóru og lýddu á.

Fótbóltsdysturin er millum KÍ og B36 byrjar kl. 16.00.

# Jákup er okkara besti málverji

**Jákup Mikkelsen fekk rósandi umtalu aftaná sín fyrsta dyst fyri Molde. Ein vælspældur dystur har Molde var nærmast at fáa øll stigini við sær móti besta norðurlendska liðnum seinastu árini Rosenborg.**

FÓTBÓLTUR
*Jógvan Hugo Gardar, Oslo*

Jákup Mikkelsen fekk eina góða byrjan í nýggja felagnum Molde. Sviin Gunder Bengtsson, ið er venjari hjá Molde, segði aftaná dystin at hann ikki er í iva um at Jákup Mikkelsen er besti málverjin sum Molde hevur.

Dysturin millum Molde og Rosenborg bleiv frammanundan kallaður fyri ein hat-dystur, tí hesi bæði feløgini eru millum tey sum seinnu árini hava ligið ovarlaga í norsku kappingini og dystirnir eru oftani spennandi millum liðini. Tey spæla bæði undirhaldandi fótbólt og kunnu ikki í spælistíli sammetast við norska landsliðið.

Rosenborg hevur seinnu árini vunnið dystarnar í Molde, og fleiri ár eru síðani Molde megnaði at skjóta mál móti Rosenborg á heimavølli. Hóast jøvn lið so hevur Molde ikki fingið mál móti Rosenborg seinastu sjey heimadystirnar.

### Føroyar-Ísland

Í ár kom vend í. Molde fekk miðskeiðis í fyrra hálvleiki mál. Hetta hendi beint eftir at Rosenborg hevði havt eitt álop á Molde-málið, men Jákup bjargaði tá ein Rosenborg-leikari einsamallur við Jákupi royndi at stúta í mál.

Eitt sindur stuttligt fyri okkum í útnorði var at málverjarnir í dystinum eisini eru landsliðsmálverjar hjá Føroyum og Íslandi.

Málið hjá Molde skjeyt Andre Schei Lindbæk í 24 minutti. Íslendski landsliðsmálverjin Árni Gautur Árason hevði ongan møguleika at taka skotið, sum kom fra fimmetrinum. Í hinum endanum fekk Rosenborg mál aftaná eitt hornaspark. Førlyski landsliðsmálverjin hevði ikki møguleika at røkka bóltin, ið fyrst kom í høvdið á einum Rosenborg leikara, Erik Hoftun. Bólturin fór uppum Jákup, og hóast ein Moldeleikari stútaði bóltin út aftur, so var hann farin um hvítu linjuna fyrst.

### Góð skoðsmál

Dysturin varð væl spældur og var javnur, hóast Molde kom nærmast at gera eitt mál ella tvey afturat. Hóast hat-stempuli so gekk dysturin friðarliga fyri seg. Trý gul kort komu í dystinum, eitt til Molde og tvey til Rosenborg. Norsku fjølmiðlarnir geva Jákupi góð skoðsmál aftaná dystin.

Aftenposten hevur stóra mynd har Jákup liggur flatur og tekur ímóti einum Rosenborg-skoti. Blaðið skrivar at Jákup virkaði eitt sindur nervøsur í fyrstuni, og at hann var heppin at ikki Rosenborg ikki fekk fleiri mál. Jákup Mikkelsen fekk fimm frá Aftenposten. Hetta er góðkent. Teirra skoðsmál ganga upp til tíggju Á Molde-liðnum fingu flestu leikararnir fimm – fýra leikarar fingu seks. Hjá Rosenborg fingu flestu leikararnir eisini fimm og seks, men tveir fingu fýra. Arni Gautur Arason fekk seks, og er tað ikki so løgið, tí hann var tann sum oftast noyddist at gera nakað.

Í Verdens Gang fær Jákup seks, og er næstbestur á liðnum. Bert Magne Hoset sum besti leikari á vøllinum fær betri – eitt sjey tal. Árni Gautur Árason fekk eisini eitt sekst-tal.

Í Dagbladet er Jákup eisini mettur sum næstbesti leikari á Molde-liðinum. Jákup fær eisini her eitt seks-tal, meðan besti leikarin fær eitt sjey-tal. Her fekk Árni Gautur Árason eitt fimmtal.

### Til Moss

Komandi vikuskifti skal Molde spæla ímóti Moss sum liggur sum nummar 9 av 14 liðum í norsku Tippeligaen. Venjari hjá Moss er Knut Eggen. Hann er sonur Nils Arne Eggen sum er venjari hjá Rosenborg.

Hendan dystin má Molde vinna fyri at fáa fatur á teimum fimm liðunum sum liggja frammanfyri teir.



# Todi kann missa 250 túsund krónur

**Um tað eydnast FCK at spæla seg í bólkaspælið í Europa Cup, so fáa bara teir spælararnir bonus, sum hava spælt við**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*



Tað kostar nógv at vera fulltíðar yrkis fótbóltsspælari og at vera skaddur. Tað er støðan júst nú hjá Toda Jónsson eitt gott dømi um.

Um tað vil illa til hjá Toda, og hann ikki verður tøkur í innleiðandi dystnum í Europa Cup kappingini, so er møguleiki fyri, at hann spælir av við 250 túsund krónur.

Í kvøld skal FCK spæla í 2. innleiðandi umfarinum í Europa Cup fyri meistaralið. Dysturin verður í Georgia. Komandi mikukvøld verður seinni dysturin í Keypmannahavn. Sambært danskar fjølmiðlar í gjár, so er avtala gjørd ímillum leiðsluna í FCK og spælararnar um, at spælararnir skulu fáa 50 túsund krónur í part, um teir megna at vinna samanlagt ímóti georgiska liðnum.

Men tað eru bara teir spælararnir, sum eru í hópinum, sum fáa løn. Tað gongur í hesum førinum út yvir Pascal Simpson, sum ikki er við Í Georgia. Hann varð vøddaskaddur undir venjing sunnudagin. Tá tað ikki varð roknað við, at hann kundi spæla við í kvøld, lótu teir hann vera eftir í Keypmannahavn, og tað kostar.

Todi Jónsson verður ikki við í kvøld, og hann verður heldur ikki við komandi mikukvøld. Tað vil siga, at Todi er útilokaður frá teimum hálvt hundrað túsund krónunum, sum spælararnir fáa, um tað eydnast teimum at fáa FCK víðari á vegnum ímóti bólkaspælinum.

### 200 túsund ímóti Lazio

Sum vit søgdu í gjár, so er stóra avbjóðingin hjá FCK Lazio. Tað verður neyðugt at vinna á italska liðnum, um FCK skal sleppa upp í part, har teir heilt nógvu pengarnir eru at vinna.

FCK leiðslan og umboð fyri spælararnar eru vorðin samd um, at um tað eydnast at vinna á Lazio, so skulu spælararnir fáa 200 túsund krónur í part. Men tað eru bara teir spælararnir, sum taka lut í stríðnum, sum fáa pengar. Tí er tað framvegis ein opin spurningur, um Todi Jónsson fer at hava møguleika fyri at fáa part av køkuni.

### Milliónirnar rulla

At FCK egnir spælararnar stórt er ikki so undarligt. Um tað eydnast FCK at spæla seg í bólkaspælið í Europa Cup, so fara milliónirnar rættuliga á rull. Upphæddirnar í komandi meistarakappingini verða neyvan minni, enn tær vóru í fjør. Tá fingu øll 28 liðini, sum vóru við í bólkaspælinum, 2,5 milliónir sveisiskar frankar ella 12–13 milliónir krónur frá UEFA fyri at hava kvalifiserað seg, og fyri at spæla í fyrsta umfarinum fingu tey 15 milliónir í part – umframt at tey fingu gjald fyri hvørt stigið, tey megnaðu at fáa.

Pengarnir verða býttir millum feløgini og spælararnar. Hvussu býtið er, man vera ymiskt frá felag og til felag. Tað veldst um hvørjar avtalur semja fæst um. Og sovornar avtalur eru m. a. tengdar at, hvussu stórar føstu mánaðarlønirnar eru.

At Todi ikki fær lut í bonuspengunum frá innleiðandi umfarinum – um tað eydnast FCK at spæla seg víðari – sigur ikki tað sama, at hann líður hungur og hall. Tað sigst, at FCK spælararnir fáa bestu mánaðarlønirnar í donskum fótbólti – um teir spæla, ella um teir eru uttanfyri, t. d. tí teir eru skaddir.

Fótbóltsspælarar vilja fegnir vera við, har tað gongur fyri seg. Teir hugsa neyvan so nógv um pengar, men tað sigur seg sjálvt, at fíggjarligi parturin er ein eyka motivatión, tá talan er um so stórar upphæddir, sum omanfyri eru nevndar.



*Álvur Hansen er venjari hjá U19 kvinnulandsliðnum, sum verður við í EM-kapping í september*

## Úttøkuvenjing til U19

Álvur Hansen, landsliðsvenjari hjá U19 kvinnlandsliðnum í fótbólti, hevur boðsent fremstu spælarunum í hesum aldursbólki til úttøkuvenjingar.

Fyrsta venjingin var um vikuskiftið, og í næstu viku skulu kvinnurnar aftur venja.

Venjingarnar eru liður í arbeiðnum at taka út landslið, sum skal luttaka í EM-undankapping í september mánaði. Í hesi kapping skal liðið spæla ímóti Litava, Bosnia-Herzogovina og Turkalandi.

Tær, sum hava fingið boð um at møta, eru: Elin Katrina Haraldsen, Asta Magnussen, Guðrun Joensen, Ása Christiansen úr AB, Rósmai Haraldsen, Beinta Joensen, Laila Enghamar, Heidi Hansen, Selma Dahl Erol úr B36, Mathea Olsen, Gerda Magnussen, Sólrun Olsen úr B71, Fríða Petersen, Linda Weihe, Kristina Dalberg Simonsen úr HB, Maibritt Olsen, Sóley Einarson úr B68, Anna Kristina Joensen úr GÍ, Paula Sjóstein, Elsa Maria Simonsen úr KÍ, Laila Jespersen, Marita Joensen úr VB, Jana Jacobsen, Heidi Maria Akselsen úr MB.

Álvur Hansen er venjari, og Jón Harald Poulsen hjálparvenjari. Hesir báðir stóðu eisini á odda fyri A-landsliðnum hjá kvinnum, sum vann gull á Oyggjaleikunum.

**ek**

# Niklas skal í stuttar brøkur á ólavsøku

**Eiler Rasmussen skal døma kvinnufinaluna, og Niklas á Liðarenda skal døma finaluna um løgmanssteypið**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Fótbóltsfepurin er í hesum døgum hægri, enn hann plagar at vera í ólavsøkuvikuni. Orsøkin er eyðsýnd. Fyri fyrstu ferð í mong ár stendur nakað upp á spæl í ólavsøkufótbóltinum. Ólavsøkudag verða finalurnar í steypakappingini spældar – bæði hjá monnum og kvinnum.

### Eiler og kvinnurnar

Hóast einki stóð um tað í ólavsøkuskránni í ólavsøkublaðnum hjá Sosialinum, sum varð borið í hvørt hús í síðstu viku, so er tað ein veruleiki, at finalan hjá fótbóltskvinnunum verður spæld ólavsøkudag.

Ólavsøkuskrúðgongan verður akkúrat líðug, tá HB og KÍ leggja til brots á Ovara vølli í Gundadali. Talan er um somu feløgini, sum vóru í finaluni í fjør og í fyrraárið. Í fjør vann KÍ 2–0, og í fyrraárið vann HB 4–3 eftir longda leiktíð.

Fótbóltssambandið upplýsir, at Eiler Rasmussen verður einasti maðurin á vøllinum. Eiler, sum sambært leygardagssosialin varð pápi í síðstu viku, hevur dømt í kvinnufótbólti og í lægri mannfólkadeildunum seinastu árini. Í ár hevur hann dømt í bestu mansdeildini, og nú sleppur hann at royna seg í einari finalu.

Linjuverjarnir verða Páll Augustinussen og Ólavur Weihe. 4. dómari verður Georg N. Rasmussen. Finalan verður ólavsøkudag klokkan 13, og tað verður býráðsformaðurin í Havn, Jan Christiansen, sum fer at handa vinnandi liðnum steypið.

Um tað skuldi lagað seg soleiðis, at tað verður neyðugt við umdysti og brotssparkskapping, so er lagt soleiðis til rættis, at hetta kann avgreiðast, áðrenn finalan um løgmanssteypið verður.

### Niklas fyri aðru ferð

Finalan um løgmanssteypið verður á Tórsvølli ólavsøkudag klokkan 16. B36 og KÍ skulu spæla. Tað vil siga, at talan verður um somu finalulið sum í fyrraárið. Tá ferðina vann KÍ 3–1.

Niklas á Líðarenda verður dómari. Á linjunum verða Tummas Pauli Olsen og Palli Gregersen, og Jens Albert Simonsen verður fjórði dómari.

Hetta er ikki fyrsta ferðin, at Niklas skal døma finalu um løgmanssteypið. Í 1993 var hann 23. maðurin á vøllinum, tá B71 og HB stríddust um løgmanssteypið. Tað er heilt víst, at gongdin ólavsøkudag verður ikki tann, sum hon var tá ferðina.

Í finaludystinum, sum var 4. august, var úrslitið 1–1, og einki mál kom í umdystinum. Tað vil siga, at Marita Petersen, løgmaður, noyddist til hús aftur, uttan at hon var sloppin av við løgmanssteypið. Nýggjur dystur varð ásettur at vera 22. september, og tá vann B71 2-1.

Síðani tá eru reglurnar broyttar, soleiðis at finalan verður avgjørd ein leikdag. Anfinn Kallsberg, løgmaður skal handa løgmanssteypið ólavsøkudag, so hesa ferð verður Niklas á Líðarenda ikki noyddur at fara aftur til Havnar at døma nýggja finalu.

Í hesi vikuni er Niklas á Liðarenda við onkrum av yngru liðunum hjá GÍ í Danmark. Har dømir hann hvønn einasta dag. Ferðalagið kemur aftur til Føroya ólavsøkuaftan. So mugu vit vóna, at mjørkin ikki fer at arga so nógv, at dómarin ikki fær møtt upp, tá finalan skal spælast á Tórsvølli.